# Villir hundar lamløsta seyð

**Í Froðba er tað ikki óvanligt, at leysir hundar gera um seg og tað var ikki tespulig sjón ein froðbingur fekk, tá ið hann hósmorgunin fór at hyggja eftir seyði**

LEYSIR HUNDAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hundurin hevur skrætt alla ullina av afturpartinum á lambinum, heilt fram ímóti huppinum. Eitt stórt, djúpt sár hevur tað á tjógvinum og týðilig merki eru at síggja eftir, har tenninar á hundinum hava skurðslað skinnið. Myndina tók Leivur Nygaard*

At hundar, sum gangas leysir, eru ein stórur trupuleiki nógva staðni í landinum, er ikki nakað nýtt.

Av og á kemur eisini fyri at hundar, sum ganga leysir, gera stóran skaða, bæði á fólk og fæ.

Eisini í Froðba eru tey rættiliga illa roynd av hundum, sum ganga leysir.

Og tá ið froðbingar fóru at hyggja eftir seyði hósmorgunin, var tað ikki tespulig sjón, sum møtti teimum.

Tá ið Jacob Ejdesgaard fór út fyri dyr, kom eitt hvítt lamb hjá honum at húsum, illa hagreidd av hundi.

Hundurin hevur skrætt at mesta av ullini av afturpartinum á lambinum, heilt framímóti huppinum og hann hevur eisini bitið tað rættiliga illa. Tað hevur eitt stórt, djúpt sár í tjógvinum, so stórt sum ein manshond, eins og týðilig merki eru eftir, hvussu tenninar hava skurðsla skinnið.

Jacob Ejdesgaard sigur, at hetta var ikki einasti seyður, sum hundur hevur verið eftir. Tvær ær vóru farnar oman á helluna á Høvdanum í Froðba.

Hann ivast ikki í, at tær eru farnar útav undan hundi.

–Vit noyddust at síga eftir teimum. Vit fingu aðra, men brimið tók hina, so hon fór til havs.

Ein onnur ær gongur eftir á helluni, men henni fóru teir ikki eftir, sum líkindini vóru. Hon gongur so mikið ovaliga, at henni fór brimið ikki við.

Somuleiðis saknar hann eina aðra ær. Hon er horvin og hann ivast ikki í, at hon er farin í havið.

### Ikki óvanligt

Hetta er ikki fyrstu ferð, at hundur er eftir seyði hjá Jacob Ejdesgaard og øðrum har um leiðir. Í fjør vórðu tvær ær lambskotnar eftir at hundur hevði verið á teimum. Eisini í vetur hava teir verið og tikið seyð upp, sum teir meta, at hundur hevur verið eftir.

Eftir hesa hendingina, er komið fram, at tað eru fleiri, sum sakna seyð og sum teir hava illgruna um, at hundar hava rikið útav og á sjógv.

Hann sigur, at teir vita ikki, hvør eigur hundin, sum hevur gjørt um seg.

Froðbingar siga, at tað eru nógvir hundar, sum ganga leysir og gera ónáðir. Teir ganga eisini úti um næturnar og kanska ganga teir eisini svangir og eru tí serliga ágangandi.

Og sum ein annar froðbingur sigur: Hvat nú, um tað er ein óviti, sum verður fyri næstu ferð?

Tilburðurin er meldaður og løgreglan kannar málið. Samstundis hava eigararnir gjørt býráðið á Tvøroyri vart við støðuna.

Annars tala myndirnar fyri seg.

# Samgongan dregur í land við skattalættanum

**– Sum støðan í samfelagnum er nú, er ringt at síggja, hvussu vit kunnu gjøgnumføra nakran skattalætta, sigur Jóannes Eidesgaard**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ómetaliga ringt at síggja, hvussu vit skulu kunna gjøgnumføra ein skattalætta, sum støðan í samfelagnum er í løtuni.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður nú við Sosialin.

Eitt tað fyrsta, sum hendan samgongan lovaði, tá ið hon tók við, var annars at lækka skattin.

Men longu nú, tað eru ikki meiri enn tríggjar vikur farnar av arbeiðsskeiðnum hjá samgonguni, er hon farin at draga í land.

Fyri Sosialinum í dag noyðist Jóannes Eidesgaard, Løgmaður, at ásanna, at ætlaði skattalættin helst verður av ongum.

– Soleiðis, sum støðan í samfelagnum er nú, verður ómetaliga trupult at síggja, hvussu tað skal bera til at fíggja ein skattalætta, sigur løgmaður.

Hann sigur, at støðan í samfelagnum er versnað nógv í seinastuni og sum útlitini eru nú, dugir hann ikki at síggja møguleikarnar fyri at lata ein skattalætta.

### Mugu finna fígging

Samgongan hevði sett sær fyri at lata skattalætta fyri 60 milliónir um árið í hesum valskeiðnum, ella fyri 240 milliónir tilsamans.

– Men ein og hvør skattalætti skal fíggjast og sum støðan í samfelagnum er nú, ber illa til at síggja, hvussu tað skal bera til at fíggja ein skattalætta, sigur Løgmaður.

Men hvat varð so av páhaldinum um, at ein skattalætti er sjálvfíggjandi. Nógvir politikarar, bæði í sambandsflokkinum og fólkaflokkinum hava ferð eftir ferð ført fram, at verður skatturin lækkaður, fær fólk betri hug at arbeiða og úrslitið er, at skattainntøkurnar hjá landinum veksa, hóast skatturin lækkar?

– Ja, hetta er ein teori um skattalættar. Men tað er sjálvsagt eitt mark fyri, hvussu langt, hetta er galdandi.

Verður farið út um hetta markið, skal fígging finnast til hendan skattalættan og hann kann bara fíggjast við peningi, sum er til avlops, ella við sparingum.

– Hetta ein fortreyt fyri hesi teori, er, at trot er á arbeiðsmegi, so at tað verður léttari at eggja fólki til at arbeiða meir, tá ið skatturin lækkar, tí so hava tey meiri eftir til sín sjálvs

– Men tíverri sær út til, at tað er eitt ávíst arbeiðsloysið í Føroyum í løtuni. Og sleppa fólk ikki til arbeiðis, ger tað heldur ikki mun hjá teimum at skatturin lækkar. Tí heldur løgmaður, at ein sum støðan er í løtuni, má ein skattalætti tengjast at møguleikanum fyri at fíggja hann. Og tað er hetta, sum løgmaður ikki dugir at síggja møguleikarnar fyri í løtuni.

– Fíggjarligu útlitini hjá landinum síggja ikki serliga bjørt út í løtuni og tað verður eitt hart baks at fáa eina forsvarliga fíggjarlóg fyri í ár.

Og sum er, bendir onki á, at gongdin fer at broytast tey næstu árini.

– Fiskiskapurin er góður, men prísirnir eru falnir nógv. Alivinnan er í andaleypi og fyri fyrstu ferð síðani kríggið er hall á roknskapinum hjá Føroya Sparikassa.

– Beint nú er tað sostatt ringt at fáa eyga á, hvussu tað skal bera til at gjøgnumføra ein skattalætta.



*Samgongan má nú umhugsa skattalættan av nýggjum. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at hann dugir ikki at síggja, hvussu tað skal bera til at fíggja ein skattaætta, sum støðan í landinum er*

### Gongur skjótt báðar vegir

Løgmaður uggar seg tó við, at í Føroyum gongur tað ómetaliga skjótt hvønn vegin.

– Støðan er versnað rættiliga brádliga og tær kunnu eisini batna líka brádliga aftur og tá er støðan eisini ein onnur, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men vistu tit ikki undir valstríðnum og undir samráðingunum um samgongu, at afturgongd var í búskapinum og var tað tí ikki ábyrgdarleyst at lova skattalætta?

– Eg haldi ikki, at tað var so týðiligt undir valstríðnum. Undir samráðingunum um nýggja samgongu, var tað týðiligari og tí varð skattalættin í fyrsta umfari skotin út til 2005.

– Sjálvandi hevur samgongan sett sær nøkur mál, men ein fortreyt fyri at røkka øllum hesum málum er sjálvsagt, at vit verða før fyri tí fíggjarliga og tað er eisini galdandi fyri skattalættan.

Kunnu vit so tvørturímóti vænta, at samgongan tvørturímóti fer at hækka avgjøld, ella at seta avgjøld í gildi fyri at fáa fíggjarlógina at hanga saman?

– Tað liggur ikki í kortunum í løtuni, men tað er ómøguligt at siga, hvat kann verða neyðugt, sigur Løgmaður.



# Vaksandi arbeiðsloysi

**Arbeiðsloysið er økt við 156 fólkum í januar í ár í mun til januar í fjør. Í løtuni stendur 3,2 prosent av arbeiðsmegini arbeiðsleys**

ARBEIÐSLOYSI
*Edvard Joensen*

Arbeiðsloysið er vaksandi í Føroyum. Í mun til januar 2003 vóru 156 fleiri arbeiðsleys fólk í januar í ár.

Samlaða talið av arbeiðsleysum, sum skrásett eru hjá ALS, var í januar mánað 824 fólk í móti 668 sama mánað í fjør. Hetta er hægsta talið síðan 2001, tá talið var 839.

Arbeiðsloysið í januar í fjør var í prosentum 2,6 prosent, og er í januar í ár 3,2 prosent.



*Arbeiðsloysið veksur um alt landið, sigur Elisabeth Gaardbo, stjóri á ALS. Tó er ein serliga stórur vøkstur at síggja í syðru helvt í Suðuroy*

Elisabeth Gaardbo, stjóri á Arbeiðsloysisskipanini, ALS, sigur, at talan er um eina generella øking av arbeiðsloysinum kring alt landið.

Tó vísa tølini, at serliga í Suðurstreymoy og í Suðuroy er vaksandi arbeiðsloysi. Í Suðuroy er trupulleikin serliga í syðru helvt.

– Har hava vit sæð virki latið aftur í fjør, og tað merkja vit so greitt á tølum okkara, sigur Elisabeth Gaardbo.

Hon sigur, at tað er nógv, sum bendir á, at tað eru mannfólkavinnur, sum hava trupulleikar í løtuni, tí talið av monnum økist í mun til talið av kvinnum, sum koma í ALS.

Uttan at hava nakrar greiðar ávísingar, bendir nógv á, sigur hon, at her er fólk frá alivinnuni uppií.

Lutfallið millum kvinnur og menn er soleiðis á leið helvt um helvt, sigur Elisabeth Gaardbo, stjóri á Arbeiðsloysisskipanini. Og umleið helvtin av teimum, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, eru ófaklærd. Tó vísir tað seg, sigur hon, at fleiri faklærdir menn enn kvinnur eru í skipanini.

Tá arbeiðsloysið hækkar, vísir tað seg ofta, at tað eru fólk millum 20 og 29 ár, sum verða arbeiðsleys. Og soleiðis er eisini hesaferð, sigur Elisabeth Gaardbo. Í hinum endanum er tað øvugt, tí har er minkað í aldursbólkinum yvir 60 ár.

Hetta er júst tað øvugt aav tí, sum plagar at henda, tá arbeiðsloysið minkar. Tá nokk er at gera, eru oftari boð eftir teimum ungu fólkunum enn teimum eldru, sigur hon.

# Nýggjur prestur í Suðurstreymoy



*Jóannes Fonsdal er nýútnevndur prestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Frá 1. mars er nýggjur hjálparprestur settur í starv í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi. Hann verður vígdur og innsettur 14. mars**

PRESTAVÍGSLA
*Edvard Joensen*

Jóannes Fonsdal, sum er ættaður av Skála, er settur í starv sum hjáparprestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi.

Jóannes Fonsdal er útbúgvin av Københavns Univeristeti, og varð liðugur við teologiútbúgvingina seinasta summar. Hann var liðugur á pastoralseminarinum til jólar, og er settur í prestastarvið í Suðurstreymoy frá 1. mars í ár, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur.

Jóannes Fonsdal verður prestvígdur og innsettur tann 14. mars, sigur biskupur. Av tí, at konfirmationirnar koma í vikunum, sum koma beint eftir grækarismessu, verða víglsa og innsetan sama dag, sigur biskupur.

Hjálparprestastarvið í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi er fulltíðarstarv. Tað hevur fyrr verið halvtíðarstarv, men er broytt.

Suðurstreymoyar eystara prestagjald er størsta kirkjusóknin í landinum og er støðugt vaksandi. Dómprósturin er eisini sóknarprestur í hesum prestagjaldinum. Men hann hevur eisini aðrar uppgávur at røkja sum dómpróstur fyri alt landið, so hansara arbeiðstíð verður býtt soleiðis helvt um helvt millum sóknarbørnini í Suðurstreymoy og kirkjurnar allar kring landið, sigur biskupur.

Til Suðurstreymoyar eystara prestagjald hoyra Havnar Kirkja, Nólsoyar Kirkja og Kaldbaks Kirkja. Prestarnir við prestagjaldið eru Bjarni Bæk, dómpróstur, Sonja Klein sóknarprestur og nú eisini nýggi hjálparpresturin Jóannes Fonsdal.

Jóannes Fonsdal, sum er 31 ára gamal, er skálamaður. Hann er giftur við Sigrid, sum ættað er av Viðareiði. Tey eiga hálvttriðja ára gamla Andreas og hálvtára gomlu Mariu Louise.

Jóannes Fonsdal hevur, meðan hann hevur búð í Keypmannahavn, verið virkin í kirkjuliðunum bæði í Eliaskirkjuni og í Samuelskirkjuni, har Bergur Jacobsen er prestur hjá føroyska kirkjuliðnum.

# Musikkandakt í Glyvra kirkju

**Mánakvøldið fer Meinhard Bjartalíð at hava andakt í Glyvra kirkju, sum hann kallar musikkandakt. Umframt eitt gudsorð, verður sálmasangur, tónleikur og kvirra á skránni**

ANDAKT
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Á musikkandaktini í kirkjuni á Glyvrum klokkan 20.30 mánakvøldið, fara tær 5, Fríðhild, Maria, Morid, Bodil og Katja at framføra tónleik á tvørfloytu.

Meinhard Bjartalíð, prestur, sigur, at ætlanin er, at henda løtan í kirkjuni skal vera sum ein oasa hjá fólki mitt í gerandisdegnum.

Prestur leggur dent á, at skapa ein friðardám í kirkjuni, og at tónleikurin er á einum høgum støði soleiðis, at fólk bæði verða styrkt og fáa eina tónleikaliga uppliving.

Umframt sálmasang og eitt gudsorð, fara vit eisini at hoyra tónleik frá hesum ungu kvinnum, sum spæla serstakliga væl. Eisini verður ein løta, sum prestur kallar kvirra. Í 2 minuttir verður tøgn, og fólk kunnu nýta kvirruna til djúphugsan ella bøn.

Genturnar eru allar úr runavíkarøkinum, uttan tónleikalærari teirra, Katja Volovelskaja, sum er russisk.

Tær fýra eru vanar at spæla saman og hava verið við til fleiri framførslur her heima. Eisini hava tær verið við í tónleikakappingum hjá Berlingske Tidende, og hava har megnað at vunnið sær heiðurspláss fleiri ár á rað.

Hetta er fyrsta andaktin av sínum slagi í hesum árinum. Tað verða hildnar 4-5 slíkar musikkandaktir um árið.



*Umframt sálmasang og eitt gudsorð, verður tónleikur á høgum støði at hoyra í Glyvra kirkju mánakvøldið*